

# Leys størv í Tórshavnar kommunu

## Maskinførari m/k til Lendisdeildina

Í Lendisdeildini verður arbeitt við gongugøtum. Til hetta arbeiði tørvar okkum ein **maskinførara.** Yvirskipað, byggja vit á ta sannføring, at gongugøtur stytta um leiðina gjøgnum býin og geva serliga børnum eina tryggari farleið. Nú sóknast vit eftir einum maskinførara, sum við støði í hesari hugsan, vil vera við til at gera enn fleiri gøtur og at bøta um tær verðandi. Arbeitt verður við smáum gravimaskinum. Hjá rætta fólkinum ber til at fáa upplæring at koyra maskinurnar. Ynskiligt er, at eisini kvinnur søkja starvið sum maskinførari í Lendisdeildini.

**Førleikar**
Koyrikort í flokki B, ella traktorkoyrikort, er neyðugt. Førleikar, sum vit ynskja, at rætti maskinførarin hevur, eru av fagurfrøðiligum slagi. Ynskiligt er, at maskinførarin hevur gott eygamát, evni at meta um rúmd og hug at ferðast í náttúruni.

**Upplýsingar**
Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Jógvan Olsen á telefon 30 20 29 + 1157, ella fartelefon 27 36 80.

**Umsókn**
Stutt, skrivlig umsókn saman við møguligum viðmælum skal sendast Tórshavnar kommunu, Postsmogu 32, 110 Tórshavn, í seinasta lagi 29. september. Eisini kann teldupostur sendast til torshavn@torshavn.fo. Merkið vinarliga brævbjálvan ella teldupostin »gøtuliðið«.

## Stuðulsfólk til Barnaverndartænastuna

Søkt verður eftir einum **stuðulsfólki** 3-4 tímar um dagin 15-20 tímar um vikuna. Uppgávan verður at fylgja tveimum børnum í vøggustovu um morgunin og heinta tey aftur seinnapart. Fyrstu tíðina kann verða talan um fleiri tímar, tí børnini skulu innkoyrast.

**Førleikakrøv**
Ynskiligt er, at tann ið settur verður, hevur viðkomandi royndir innan økið.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður lønt eftir sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Føroya Pedagogfelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu verða Tórshavnar kommunu, barnaverndartænastuni, postboks 32, FO-110 Tórshavn í seinasta lagi mánadagin 6. oktober kl.12.00.

**Nærri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til barnaverndartænastuna, á telefon 30 20 60.

**Tórshavnar kommuna**

---

Hvønn dag í september mánaða verða Sudoku uppgávur at finna í Sosialinum.

Jú fleiri uppgávur, ið tú hevur loyst, tess størri møguleika hevur tú at vinna.

Sendið okkum loysnina innan mikudagin 8. oktober 2008 kl. 10.00 og viðmerkið brævbjálvan »Sudoku«.

Vinningur í september er 2 M-semiflex flogferðaseðlar við Atlantic Airways. Virði Kr. 6.304,-

Drigið verður í viku 42.

Fyri at vera við í kappingini, skal øll uppgávan verða loyst.

**Vinnari av august-kappingini varð:**
Á. Hovgaard, Hov



# SUDOKU

## SEPTEMBER-KAPPINGIN

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 9 | | | | 3 | | 8 | 5 |
| | | | | | | 6 | 7 | |
| | | 5 | 2 | | | | | 3 |
| | | | 5 | 6 | | | | 1 |
| | | 3 | | | | 5 | | |
| 6 | | | | 9 | 7 | | | |
| 5 | | | | | 2 | 4 | | |
| | 3 | 2 | | | | | | |
| 8 | 1 | | 6 | | | | 5 | |

ATLANTIC AIRWAYS

**Navn:** ______________________

**Bústaður:** ______________________

**Telefon:** ______________________

Sendið til: Sosialin · Boks 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan »Sudoku«

**Vinningurin í september**

2 M-semiflex ferðaseðlar frá Atlantic Airways. **Virði Kr. 6.304,-**

Sosialurin